# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Sunset-kappingin brakar



*Tjaldur megnaði akkurát ikki at taka Stjørnuna, tá liðini møttust í Runavík. Nú má og skal Tjaldur vinna, um tær vilja halda fast í finalumøguleikanum*

**Tríggir serstakliga avgerandi dystir verða spældir í fremstu kvinnudeildini um vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan er veruliga um tríggjar knall-dystir, sum verða spældir í Sunset-kappingini í hondbólti sunnudagin.

Lagt verður fyri á Skála klokkan 14.30 við einum dysti, har Kyndil hevur mest sum alt at spæla fyri móti StÍF.

Hóast kappingin enn er ung, so tykjast hini fýra liðini at vera eina tonn ella tvær betur enn Kyndil og StÍF, og tí verða innan hýsis dystirnir millum hesi helst avgerandi fyri, hvat av liðunum endar aftast og harvið á niðurflytingarplássi.

Fyrstu innanhýsis uppgerðina vann StÍF í Havn, og tí kunnu tær við einum sigri sunnudagin gera uppgávuna hjá Kyndli serstakliga trupla. Ein útisigur ber hinvegin við sær, at kappingin aftur verður púrasta opin í botninum.

## Oddurin kann skrædna

Og í oddinum er talan eisini um seinasta útkall hjá bæði Neistanum og Tjaldri, sum spældu javnt í sínum innanhýsis dysti seinasta vikuskiftið.

Neistin skal á útivølli takast við VB, sum veruliga tykist vera í gongd við at finna FM-formin framaftur, og skulu tær bláu gera sær vónir um at hanga í oddinum, so er kravið tvey stig í Vági.

Og sum so eru fortreytirnar tær somu hjá Tjaldri, sum fer á vitjan í Klaksvík. Fyrra dystin millum liðini vann Stjørnan sera tepurt í Runavík, og so er spurningurin, um føroyameistararnir verða meira sannførandi hesaferð, ella um uppflytararnir eru vorðnar enn sterkari.

## Stórdystur í Hoyvík

**H71 og Neistin hava víst seg sum liðini, sum kapprenna við VÍF um sess í FM-finaluni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sigurin hjá H71 á StÍF seinasta sunnudag bara við sær, at oddurin nú er ein kapping millum VÍF, H71 og Neistan.

Júst H71 og Neistin hittast sunnudagin, og hesin dysturin verður helst avgerandi fyri, hvør teirra hevur kanska avgerandi munin, áðrenn farið verður undir seinnu hálvu av kapprenningini.

Bæði liðini hava havt sínar trupulleikar við veruliga at fáa gongd á spælið, men í so máta eru ikki longur veruliga ráð at eksperimentera.

Hinir báðir dystirnir hava á pappírinum greiðari favorittar. Hinvegin hevur Kyndil bert fingið eitt stig í ár, og var hetta móti júst StÍF. Standingarnir hava hinvegin ikki ráð at missa, um teir skulu hanga við í oddastríðnum.

Seinasti dysturin er í Kollafirði, har VÍF er greiður favorittur móti KÍF. Men hinvegin er grannauppgerðin í Norðstreymoy aloftast av heldur intensa slagnum, og tí er talan hóast alt um rímiliga opna uppgerð.

# Soleiðis svimja tey

**Føroysku svimjararnir farfóru í gjára í dag í hylin í EM-kappingini á stuttbana. Frá svimjisambandinum verður upplýst, at svimjararnir komandi dagarnar svimja í hesum kappingum:**

**Fríggjadag**
*Kári á Høvdanum*
50 ryggsvimjing
tilmeldingartíð 0:26,11
tilmeldaður sum nr. 33 av 45

*Mona Simonsen*
800 frísvimjing,
tilmeldingartíð 9:09,59
tilmeldað sum nr. 18 av 24

**Leygardag**
*Kári á Høvdanum*
100 Ryggsvimjing
tilmeldingartíð 0:56,13
tilmeldaður sum nr. 33 av 36

*Mona Simonsen*
400 frísvimjing
tilmeldingartíð 4:30,72
tilmeldað sum nr. 36 av 41

*Pál Joensen*
1500 frísvimjing
tilmeldingartíð 14:48,89
tilmeldaður sum nr. 8 av 23 (beinleiðis finala)

**Sunnudag**
Mona Simonsen
200 frísvimjing
tilmeldingartíð 2:09,88
tilmeldað sum nr. 47 av 52

*Shaila millum Garðarnar*
50 frísvimjing
tilmeldingartíð 0:26,88
tilmeldað sum nr. 54 av 59

Pál Joensen
200 frísvimjing
tilmeldingartíð 1:47,13
tilmeldaður sum nr. 29 av 67

**Sjónvarpið er í samráðingum við EBU um at senda frá kappingini. Annars kann fylgjast við í myndum, livandi brotum og streaming frá Kroatia á www.svimjing.com**